# VIKULIÐIÐ

vodafone **deildin** VIKA 24

*Ítróttartoymi úttekur Vikuliðið, og eru leikarans avrik mett út frá Vodafone-dystunum í farnu viku.*




Uppstilling: **3-4-3**

## 1. DEILD MENN

**NSÍ - EB/Str.** 2-1 (1-0)
1-0: Magnus Sørensen, 30.
2-0: sjálvmál, 46.
2-1: Jens Jensen, 60.

**B68 - FCH** 0-2 (0-1)
0-1: Jørgen Meitilberg br 18.
0-2: Thomas Hans Rubeksen 88.

**KÍ - TB** 1-0 (0-0)
1-0: Steffan Kalsø 81.

**Víkingur - AB** 2-3 (2-2)
0-1: Jákup P. Dam 9.
1-1: Andras Mikkelsen 14.
1-2: Dan Petersen 15.
2-2: Andras Mikkelsen 17.
2-3: Áki Olsen 52.

**07 Vestur - HB** 2-0 (2-0)
1-0: Ragnar Niclasen 13.
2-0: Jovan Panic 41.
*Reytt kort: André Johansen, 07 Vestur, (2 gul) 48.*

### Føroyska 1. Deild *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 13 | 9 | 2 | 2 | 32 | 10 | +22 | 29 |
| 2 | TB | 13 | 9 | 1 | 3 | 34 | 15 | +19 | 28 |
| 3 | 07 Vestur | 13 | 7 | 4 | 2 | 29 | 14 | +15 | 25 |
| 4 | EB/Streymur II | 13 | 6 | 3 | 4 | 22 | 16 | +6 | 21 |
| 5 | HB II | 13 | 6 | 1 | 6 | 23 | 31 | -8 | 19 |
| 6 | Víkingur II | 13 | 5 | 3 | 5 | 20 | 19 | +1 | 18 |
| 7 | NSÍ II | 13 | 3 | 6 | 4 | 15 | 21 | -6 | 15 |
| 8 | AB II | 13 | 4 | 1 | 8 | 16 | 30 | -14 | 13 |
| 9 | FC Hoyvík | 13 | 2 | 5 | 6 | 12 | 20 | -8 | 11 |
| 10 | B68 II | 13 | 0 | 2 | 11 | 5 | 32 | -27 | 2 |

### Máltindurin 1. deild 2010

Jovan Radinovic-Panic, 07 Vestur . . 9
Jens Erik Rasmussen, 07 Vestur . . 8
Joseph Y. Bassene, TB . . . . . . . . 7
Henry Heinesen, KÍ . . . . . . . . . . 6
Johan Ejvind Mouritsen, HB II . . . . 6
Steffan Kalsø, KÍ . . . . . . . . . . . 6
Dan Mortensen, TB . . . . . . . . . . 5

# KÍ nýtt oddalið




*Mynd: Norðlýsið*

**1. DEILD MENN** Eftir tepran 1-0 heimasigur á TB hevur KÍ lagt seg á odda í næstbestu fótbóltsdeildini

**Tróndur Arge**

KÍ er nýtt topplið í næstbestu fótbóltsdeildini. Tað var greitt tíðliga leygarkvøldið, tá ið dysturin í Klaksvík millum KÍ og TB var liðugur. KÍ vann 1-0. Einsamalla málið skoraði Steffan Kalsø við fínum fluktskoti, tá ið tað bara restaðu sjey minuttir.

Eftir at tað leingi hevur hilnast illa, eydnaðist tað 07 Vestur at vinna fulla úrtøku, tá ið HB vitjaði í Sørvági. Eitt lítið korter var farið, tá ið Ragnar Niclasen við høvdinum stýrdi bóltin í málið eftir hornasparksinnlegg, og stutt fyri hálvleik økti Jovan Panic um heimaleiðsluna til 2-0. Tað var við beinleiðis fríspark. 07 Vestur fekk tíðliga í seinna hálvleiki ein mann útvístan, men hóast HB royndi at trýsta, so var sigurin onagtíð í vanda.

Teir næstbestu hjá AB vunnu á teimum næstbestu hjá Víkingi. Stóra hetjan hjá argjamonnum gjørdist Áki Olsen, sum tíðliga í seinna hálvleiki skoraði avgerandi málið fyri argjamenn í 3-2 sigrinum á Víkingi. FC Hoyvík vann 2-0 á Svangaskarði. Hóast sigurin er FC Hoyvík framvegis illa spert í botninum. Eftir 13 umfør er úrtøkan hjá B68 framvegis bara tvey stig.

*trondur@sosialurin.fo*

### Føroyska 1. Deild *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 11 | 10 | 1 | 0 | 55 | 6 | +49 | 31 |
| 2 | AB | 11 | 8 | 0 | 3 | 52 | 8 | +44 | 24 |
| 3 | Skála | 11 | 4 | 4 | 3 | 23 | 15 | +8 | 16 |
| 4 | Víkingur | 11 | 4 | 1 | 6 | 12 | 28 | -16 | 13 |
| 5 | EB/Streymur | 11 | 1 | 4 | 6 | 8 | 36 | -28 | 7 |
| 6 | MB | 11 | 0 | 2 | 9 | 6 | 63 | -57 | 2 |